NØVN NÚ NØVN NÚ NØVN NÚ

Heilsanir



Brian 17 ár - Góði gubbi
Tillukku gubbi, vit síggjast tann 31.8.
Heilsan ***Teinar***



Góðu babba og Pauli
Hjartaliga tillukku við døgunum 30. august.
Ynskja ***Malan og Snorri***



Góði Richard
Hjartaliga tillukku á 50 ára degnum ynskja vit øll.
Mathias



Hey Rói, Fróði, Bróði, Gróði, Lóði.
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Men hoyr? Nú ert tú undarligur.
Heilsan ***tær undarligu (how how)***



Góði Holgar!
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 28.8.
Heilsan ***vit triggjar norðanfyri***
P. S. Her sært tú fittur og óskyldigur út, men...



Elskaða mamma
Hjartaliga tillukku við 21 ára degnum sum var 27. august. Harrin signi framtíð tína.
Ynskir ***Fríði***



Góði abbi
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum. Takk fyri í summar. Eisini ein heilsan til ommu.
Kærar heilsanir frá ***Emy og Elinbjørg***



Góða fastur
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum tann 29. august. Alt gott framyvir.
Bestu heilsanir frá okkum ***Eskild og Estrid***



Góði elskaði Pauli
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
Mamma og babba



Góði Pauli
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum.
Ynskja ***omma og Bent***



Góða fitta omma
Tillukku á 80 ára føðingardegnum. Takk fyri mangar góðar løtur á Flatutrøð.
Ynskja ***ommubørnini***



Góði Óli
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum.
Heilsan ***mamma, babba, Liv og Niklas***



Góða Katrin Maria
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum í dag.
Bestu heilsur mamma, babba, Eyðun og Høgni



Halló »Heidi the hunter« Petersen
Ja, nú er gott at vera vælútgjørd!!! Minst til at finstilla teleskopini og hava antennurnar úti í vikuskiftinum!
Heilsan ***»hin hampuliga í F52673«***
P. S. Góða »veiðuferð«

NØVN NÚ *fyri* ***kr. 20,***
5 ferðir um vikuna

GEVIÐ GÆTUR
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 20,-
í ❒ frímerkjum, ❒ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 –16.00.

Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❒ Tý. ❒ Mi. ❒ Hó. ❒ Frí. ❒ Ley.

Tekstur: _____

MYNDINA AFTUR: Minnist til tá at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur: (skal fyllast út).

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____ Tlf.: _____

Sendið lepan, mynd og gjald til: **Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »NØVN NÚ«